# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Mítt ævintýr í bláum endar her*

*Alessandro Nesta*

# Jón Rói farin aftur at venja

**AaB avrikið í Randers í gjárkvøldið vísti, at tað var stórur saknur í føroyska landsliðsspælaranum, sum seinastu dagarnar hevur verið skaddur**




*Talan gjørdist um sanna marru hjá AaB, tá liðskiparin, Danny Califf, varð útvístur eftir bara ein minutt á vøllinum*

*Mynd: Polfoto*

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Úrslitið var ljótt, tá ið AaB, sum hevur tveir føroyingar á lønarlistanum, í gjárkvøldið var í Randers. Heimaliðið vann 5-0 eftir hálvleiksstøðuna 3-0. Alt vendi skeiva vegin hjá AaB, sum misti annan av miðverjunum og liðformannin, tá ið bara ein minuttur var farin. Reyða kortið varð tikið úr reyvalummanum, tí Danny Califf hevði nýtt neyðbremsuna.

Reyða kortið ber við sær, at plássið í miðverjuni stendur opið fyri Jón Róa Jacobsen, tá ið AaB sunnudagin fer at spæla í Horsens. At Jón Rói Jacobsen ikki var við í gjárkvøldið og sunnukvøldið, tá ið AaB vann seg úr Intertoto og í UEFA, er ikki orsaka av, at venjarin hevur vigað føroyska landsliðsspælaran og funnið hann at vera ov léttan.

Jón Rói hevur ikki verið førur fyri at spæla seinastu dagarnar. Í fyrsta landskappingardystinum í nýggja kappingarárinum var Jón Rói ógvuliga stinnur, tá ið AaB spældi 1-1 á heimavølli ímóti FCK. Í tí uppgerðini koykti føroyingurin fótin. Hann spældi tó dystin á tamb, og hann var ímillum teir stinnastu. Men síðani hevur Jón Rói ikki verið førur fyri at venja við fullari ferð. Tí hevur hann ikki spælt tvær tær seinastu ferðirnar.

Í dag fór Jón Rói aftur at venja saman við hinum, og tað er einki at ivast í, at tað er brúk fyri honum.

## Skelkur

Úrslitið í gjárkvøldið var stórur skelkur fyri AaB. Bronsuvinnararnir frá síðsta kappingarárið hava staðið seg væl seinastu tíðina, og teir hava ikki tapt fimm tær seinastu ferðirnar.

Randers hevur, síðani teir fyri tveimum árum síðani vunnu seg í superliguna, verið roknað millum evnini at flyta niður. Nú eru teir oddalið við níggju stigum og harvið fullum stigatali, meðan AaB, sum hevur spælt tvær ferðir, meðan flestu av hinum hava spælt tríggjar ferðir, bara hevur eitt stig.

Svenski AaB venjarin, Erik Hamrén, skýrdi í gjárkvøldið ferðina til Randers at vera sanna marru. Hann var illa nøgdur við liðið bæði í verju og álopi. At fýra av málunum vórðu skorað eftir innlegg í brotsteigin, helt hann vera merkisvert. At liðið var undirmannað mest sum alla tíðina kundi ikki nýtast sum einvís undanførsla.

Súni Olsen var ikki millum teir fyrstu ellivu hjá AaB. Súni varð settur á vøllin beinanvegin eftir steðgin, men tá var ballið longu buðið hjá AaB, sum legði rygg til púra óvæntað stórtap.

# Troytt talent taptu tepurt

**Einsamalla málið, sum AGF skoraði ímóti føroyska U-19 landsliðnum, var sjálvmál tíðliga í 2. hálvleiki**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gekk ikki, tá ið U-19 unglingarnir í gjár spældu ímóti talentliðnum hjá superligufelagnum AGF. Úrslitið var 1-0 tap. Málið varð skorað í 49. minutti, og tað var óheppið. Eftir innlegg úr høgru snittaði bólturin ein av føroysku verjuspælarunum, sum ikki var kroystur, og harvið varð málverjin, Hans Jørgensen, snýttur.

Talan var um tætta uppgerð, og sambært annan av føroysku venjarunum, Abraham Løkin, vóru føroyingarnir ikki aftanfyri mótstøðumenninar í førleikunum, sum skulu til.

Føroyska liðið hevði møguleikar, og føroyingarnir á og kring vøllin – millum teirra a-landsliðsvenjarin Jógvan Martin Olsen – skiltu ikki, at dómarin ikki bríkslaði, tá ið ein av mótstøðumonnunum í brotsteiginum vardi fyri skoti við báðum hondum.

Kappingin í Lyngby tænir sum fyrireiking og úttøkukapping til EM undankappingina, sum Føroyar í oktober verður partur av í Bulgaria. Tá verður avbjóðingin ivaleysa stór, tí mótstøðulondini umframt Bulgaria verða Danmark og Turkaland. Leikdagarnir verða 10., 12. og 15. oktober.

– Eitt nú fáa vit her niðri staðfest, hvussu venjingarstøðan er. Hetta fara vit at kunna venjararnar í feløgunum um. Sum heild kunnu vit ikki siga annað, enn at hugburðurin er góður, og tað sást aftur ímóti AGF, hóast spælararnir vóru troyttir. Teir høvdu spælt dagin fyri, meðan AGF hevði havt frí týsdagin, sigur annar av venjarunum Abraham Løkin.

Seinnapartin í morgin skal føroyska liðið spæla ímóti B93, og fyrrapartin leygardagin skulu teir spæla ímóti Lyngby. Ætlanin er, at teir, sum ikki hava verið so nógv á vøllinum í fyrstu dystunum, skulu fáa meiri spælitíð næstu dagarnar.

Føroyska liðið ímóti AGF: Hans Jørgensen, Skála - John Hammer, KÍ, Rógvi Holm, liðformaður, AB, Torkil Kollsker, HB, Erling Jacobsen, GÍ - Rógvi Poulsen, AB, Oddmar Færø, B36 (Jóhan Ellingsgaard, B36, 46.), Heri Nesá, ÍF (Álvur F. Christiansen, KÍ, 63.), Pól Jóhannes Justinussen, GÍ - Jann Martin Mortensen, NSÍ (André Olsen, B68, 46.) - Øssur Dalbúð, NSÍ (Klæmint A. Olsen, NSÍ, 70.).

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Rasmus Nielsen, B71, Páll Klettskarð, KÍ og Petur á Roykheyggi, NSÍ.

Venjarar eru Abraham Løkin og Albert Ellefsen.

## EB/Streymur hevur vónina

Bæði EB/Streymur og B36 dystast í kvøld í europiskum høpi. EB/Streymur spælir á Tórsvølli móti finska MyPa, og eftir tepurt 1-0 tap í fyrra dystinum eru vónirnar hjá felagsliðnum kanska ikki heilt ongar.

Men tað krevur fyrst og fremst ein sigur, og so er spurningurin, um EB/Streymur megnar at skapa neyðuga trýstið, samstundis sum teir helst skulu halda tætt sjálvir, soleiðis at uppgávan ikki gerst alt ov tung.

B36 spælir á útivølli móti litaviska Ekranas. Fyrra dystin, sum varð spældur á Tórsvølli fyri tveimum vikum síðani, vann Ekranas 3-1, og tí er lítil ivi um, at tað verða teir, sum fara víðari til næsta umfarið í kappingini.

**-mørk**

## Nesta gevst á landsliðnum

Í gjár boðaði italski verjuleikarin Alessandro Nesta frá, at hann gevst á landsliðnum Tað merkir við øðrum orðum, at hann heldur ikki verður við, tá Føroyar fara at spæla í Italia 21. november. – Eg fari ikki at spæla á landsliðnum aftur. Mítt ævintýr í bláum endar her, sigur Alessandro Nesta sambært Ekstra Bladet. Nesta var ikki við, tá Italia var í Føroyum í junimánaði. Hann hevur ikki verið í bláa búnanum síðani HM-endaspælið í fjørsummar, tá hann gjørdist skaddur longu í bólkaspælinum. Nesta spælir dagliga við AC Milan. Hann 31 ára gamal og hevur spælt 78 landsdystir.

**-rwd**